# ELDRABYLGJA OG FRÁFLYTING **ERU STØRSTA AVBJÓÐINGIN**

**JOHNNY Í GRÓTINUM**, BÚSKAPARFRØÐINGAR, **SKAPTI** SO STÓRAN **ÁHUGA** FYRI SÍNUM FYRILESTRI, **»TANN SEINASTI PENSJÓNISTURIN SLØKKIR,«** Í KLAKSVÍK Í **FARNU** VIKU, AT **120** FÓLK MØTTU UPP AT **LURTA**. YVIRSKRIFTIN TÓK **SAMAN** UM STØRSTU **AVBJÓÐINGINA** HJÁ KLAKSVÍKINI SUM **BÝI**. PENSJÓNISTARNIR **FJØLGAST**, **MEÐAN** TEY ARBEIÐSFØRU **FÆKKA**. – KENNA VIT **VERULIGU** TØLINI, KUNNU VIT SETA **KÓS** AT VENDA **GONGDINI**, OG **KLAKSVÍKIN** HEVUR LONGU SETT EIN **VAKSTRARBÓLK** AT KANNA, HVUSSU GONGDIN KANN **VENDAST**. TAÐ ER BÆÐI **FRAMSØKIÐ** OG SKILAGOTT, SIGUR **JOHNNY Í GRÓTINUM**





**FYRILESTUR**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Ein søga er um onglendingar og japanarar, sum møtast á eini ráðstevnu. Onglendingarnir arga japanararnar við, at teir gera altíð forsagnir um framtíðina, men at forsagnirnar ganga ongantíð út. Tá flenna japanararnir hjartaliga og siga, at soleiðis kunnu bara ítøkiligir onglendingar tosa. Forsagnir verða ikki gjørdar fyri, at tær skulu ganga út. Tær verða gjørdar fyri at skilja, hvussu støðan er nú, og er støðan álvarslig, má kósin broytast, so forsøgnan ikki endar sum ein beiskur veruleiki seinni.

Johnny í Grótinum hevði fylt sær lummarnar við bæði tølum og forsagnum, tá hann í farnu viku helt fyrilestur í Ósáskúlanum um fólkasamansetingina í Klaksvík og landinum annars. Høvið var, at Torradagar vóru í Klaksvík, og upprunaliga skuldi fyrilesturin haldast á Klaksvíkar Bókasavni, men búskaparfrøðingurin og bankamaðurin hevði prýtt sín fyrilestur við eini so provokerandi yvirskrift, at bæði maður og kvinnu fóru av húsum at lurta. Var tað so galið, at avtofting var í durunum, og at ljósið skuldi sløkkjast?

> Tølini vísa, at í Klaksvík búgva 30 prosent færri í aldursbólkinum 30-40 ár í dag, enn vit vóru í aldursbólkinum 10-20 ár í 1990. Greitt er, at hesi tølini eru ein avbjóðing

## Hagølini tala

So galið var tað ikki, men Johnny í Grótinum greiddi við hagtølum frá, at gongdin í fólkasamansetingini í Klaksvík seinastu 20 árini hevur verið skeiv. Hann vísti á, at síðan 1990 er talið á fólki yvir 67 ár økt 33 prosent, meðan talið á fólki í arbeiðsførum aldri millum 16 og 67 ár er minkað 8 prosent. Í 1990 vóru 479 fólk yvir 67 ár í Klaksvík. Í 2010 vóru tey 637. Talið á fólki í arbeiðsførum aldri millum 16 og 67 ár var 3160 í 1990 og 2922 í 2010. Gongdin er sostatt ikki at fara skeiv av. Tey eldru fjølgast, og hini fækka.

– Sjálvur flutti eg úr Klaksvík í 1995, tá eg fór undir hægri lestur uttanlands.

Í hagtølunum havi eg so eisini hugt at gongdini í mínum egna ættarliði við at hyggja at íbúgvaratalinum í aldursbólkinum 10-20 ár í 1990, 20-30 ár í 2000 og 30-40 ár í 2010. Her vísa tølini, at í Klaksvík búgva 30 prosent færri í aldursbólkinum 30-40 ár í dag, enn vit vóru í aldursbólkinum 10-20 ár í 1990. Greitt er, at hesi tølini eru ein avbjóðing, men eg vísti so eisini á, at handan tølini eru fleiri góðar søgur um væl eydnaðar karrierur hjá klaksvíkingum uttanlands, sigur Johnny í Grótinum.

Veruleikin er, sigur hann, at fleiri klaksvíkingar standa seg væl úti í stóru verð, sum við alheimsgerðingini er vorðin ein stórur arbeiðsmarknaður. Todi Jónsson í Danmark er eitt dømi. Eitt annað dømi er Jan Ziskasen í USA. Hann er KT-stjóri í størstu matvørufyritøkuni í heiminum, Kraft Foods. Ein tílík avbjóðing finst hvørki í Klaksvík, Havn ella aðrastaðni í Føroyum. Johnny í Grótinum nevndi eisini Boga Andreassen, klaksvíkingin, ið endaði sum varaborgarstjóri í Havn. Og aðrir fráfluttir klaksvíkingar vórðu nevndir.

– Fráflyting er ein trupulleiki, um fólk ikki koma aftur, men aftrat tí, at alheimsgerðingin fær fólk at flyta burtur, síggja vit so eisini í dag, at fólk skifta nógv oftari starv, enn tey gjørdu fyrr. Júst hetta kann vera ein fyrimunur fyri ein bý sum Klaksvíkina. Býurin hevur ein veruligan møguleika at lokka fleiri av sínum býarbørnum heimaaftur í komandi árum, tí at skifta starv kann